# Meira løn til Ronaldo

Sunday Express skrivaði í gjár, at Manchester United ætlar at geva Cristiano Ronaldo enn størri løn næstu árini. Ronaldo fær í løtuni meira enn eina millión krónur um vikuna í løn, men ætlanin er, at hann skal vinna 1,4 millión um vikuna. Hetta skal verða við til at tryggja, at Ronaldo eisini næstu árini fer at spæla fyri enska meistaraliðið.



# Ragnar undirhelt

Saman við bólki sínum A55 fekk nýggjasta føroyska stjørnan, Ragnar Finsson, salin undir Fimleikafagnaðinum at sita á nálum, tá bíðast skuldi eftir voteringini hjá dómsnevndini. Talan var um frálíka framførslu, og tó at Ragnar má roknast sum stóra stjørnan í bólkinum, so var samspælið frá hinum limunum í bólkinum eisini framúr. Ikki minst frá hart spælandi og livandi solo-guitaristinum, sum gav strofur frá bæði Slash og Angus Young til áskoðararnar.

# Fagnaður fyri dualismu

**Tað góða og tað ónda. Tað myrka og tað ljósa. Tað skjóta og tað seina. Tey ríku og tey fátøku. Alt mótsetningar, sum vórðu lýstir, tá Fimleikafagnaðurin var á skránni um vikuskiftið**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Tá Gud skapti heimin, skapti hann alt í mótsetningum. Dag og nátt, mann og kvinnu, hita og kulda, tað góða og tað ónda.

Dualisman er eyðsýnd gjøgnum alt skapanarverkið, og tað var og fremst hendan, sum varð sett á breddan, tá fimleikafagnaðurin var í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið.

Seinastu mánaðirnar hava Flog, Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósið arbeitt við at lýsa bundnað evnið, sum hesa ferð var »mótsetningar«, og við hvør sínari framførslu á 15 minuttir, skuldu feløgini nú við ljóði, ljósi og rørslum vísa, hvat tey høvdu fingið burtur úr sínum arbeiði.

## Framúr framførslur

Tað serliga við Fimleikafagnaðinum fram um onnur tiltøk, er eisini, at ein av setningunum hjá feløgunum her er at vísa breiddina, sum er í hópinum. Og umframt at draga hópatals foreldur, ommur og abbar til sýningarnar, skapar hetta eisini sín heilt serstaka hugna og samleika í framsýningunum, sum ikki standa petti aftan fyri elitukappingarnar, um enn kriteriuni tá eru nakað øðrvísi.

Og tí var talan eisini um framúr undirhald í stóra salinum í Norðurlandahúsinum. At Støkk vann fagnaðin, var upp á sítt pláss, tí samlaða framførslan hjá teimum var avgjørt tann flottasta og mest fjølbroytta. Eisini tí hetta var felagið, sum hevði flest íðkandi við í framførslunum, eins og mongu ymisku búnarnir vóru hugtakandi.

Men eins nemandi var tað at síggja mongu ungu fimleikararnar hjá Flog, sum veruliga hevur fingið fatur á børnunum í Fuglafirði og Gøtu.

Ljósið hevði í síni framførslu helst mest ítøkiligu lýsingarnar av dualismuni, har kontrastirnir á gólvinum vóru serstakliga stórir, og við framúr skifti í tónleikinum var framførslan hjá Ljósinum helst tann, sum otaði seg næst Støkk, tó at dómsnevndin bert kunngjørdi ein vinnara og ikki sekunderu plaseringarnar.

Og kraftfulla framførslan hjá Havnar Fimleikafelag hevði avgjørt eisini sítt at bjóða uppá, um enn tulkingin av evninum til tíðir tóktist heldur abstrakt at fylgja við.



*Ikki minst var talan um framúrskandi pallmynd hjá Støkk, har búnarnir vóru nógvir, vakrir og fjølbroyttir. Her við frásøgn um býflugur og blómur*



*Talan var um fantastiska flottan enda hjá Støkk, tá fimleikararnir í felag formaðu eitt bankandi hjarta*



*Hjá Havnar Fimleikafelag var talan um orkumikla framførslu*



*Flog hevði helst yngsta liðið av øllum, men tað gjørdi ikki framsýningina minni hugtakandi. Heldur tvørtur ímóti*